# Grundskeið í lóg
## á Fróðskaparsetrinum

Í vár verður væl umtókta *Grundskeiði í lóg* aftur á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya.

Grundskeið í lóg er partur av samfelagsútbúgvingini á Fróðskaparsetrinum.

Skeiðið er eisini ætlað fólki, ið ikki eru lógkøn (ikki hava cand. jur. ella líknandi útbúgving) og vilja menna kunnleika sín til løgfrøðiligt háttalag og fáa betri fatan av lógum og juridiskum teksti.

Undirvíst verður tvær ferðir tríggjar tímar aðru hvørja viku, mánadag og mikudag, kl. 10.00-13.00.

Skeiðið byrjar mánadagin 4. februar 2008 og endar við eini 4-tímars skrivligari próvtøku mánadagin 26. mai 2008.

Dentur verður lagdur á praktiska almenna fatan av lógkunnleika, serliga at finna og tulka lóg, men í serliga partinum verður hugt nærri at evnum innan stjórnarlóg og fyrisiting.

Higartil hevur skeiðið verðið boðið út fýra ferðir og tilsamans 6 flokkar hava lokið prógv. Sera stórur áhugi hevur verið fyri skeiðnum.

Undirvísarar verða Kári á Rógvi LL.M. og Jógvan E. Winther Poulsen, advokatur

Fyri uttansetursfólk (tey, ið ikki lesa á Fróðskaparsetrinum) verður skeiðsgjald kravt, kr. 6.000 fyri skeiðið, íroknað skeiðstilfar. Harafturat kemur próvtøkugjald kr. 1.000.

Umsóknarblað fæst við at venda sær til Søgu- og samfelagsdeildina, J. Broncksgøta 25, 4.h., tlf. 352580. Víst verður eisini til heimasíðuna: **www.setur.fo**

**Umsóknarfreistin er sett til týsdagin 22. januar 2008.**

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

SENDISTOVAN

### Kunngerð
Sambært kunngerð nr. 109 frá 07. desember 2007 fer løgtingsval fram Leygardagin tann 19. Januar 2008 í niðaru hæddini á kommunuskrivstovuni. Atkvøðugreiðslan byrjar kl. 10.00 og heldur fram til kl. 20.00 ella so leingi veljarar møta uttan steðg

**Brævatkvøða:**
Veljarar, ið verða burturstaddir valdagin, kunnu í seinasta lagi dagin fyri valið, tann 18 Januar 2008, greiða brævatkvøðu við at venda sær til kommunuskrivstovuna. Brævatkvøður skulu verða valstýrinum í hendi innan valið byrjar kl. 10.00 tann 19 januar 2008.

### Heimaval:
Veljarar, ið vegna sjúku ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu velja heima frá 12 januar 2008 til og við tann 18 januar 2008 við at boða kommunuskrivstovuni frá – helst innan kl. 13.00 fríggjadagin tann 18 januar 2008.

### Valkort:
Valkort verða send veljarunum í kommununi við postinum, og um persónur, sum heldur seg hava valrætt, ikki fær valkort sendandi, verður viðkomandi biðin um at seta seg í samband við kommunuskrivstovuna á telefon 361034 skjótast.

Veljari skal hava valkortið við sær til valborðið.

SANDS KOMMUNA
...trygd og trivnaður fyri øll

Mørkin Mikla 3 - FO 210 Sandur - Tel: 361 034 - Fax: 361 734

Starvslýsing

Heimatænastan

## Endurlýsing eftir Heilsurøktarum til Eldrasambýlini Oman Hoydalar og í Kollafirði

Hesi størv eru leys at søkja frá 1. februar 2008:

Tvey tíðaravmarkað størv fram til 1. september 2008 sum heilsurøktarar á 35 t/um vikuna. Arbeiðstíðin er mánadag til fríggjadag kl 08:00-15:00

Arbeiðið fevnir um at hava dagliga ábyrgd av røktini hjá tí einstaka búðfólkinum, sum tekur støði í heilsurøkt araútbúgvingini, har røkt, gera virknan og ergonomisk tillagan er ein heild.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Deildarleiðaran : Tórhild Dalsgaard á tlf. 217133

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráði og avvarðandi yrkisfelag

**Umsókn**
Umsóknin við avriti av próvskjølum og CV skulu sendast til:

Nærverkið
Heimatænastan,
Skálatrøð 14
100 Tórshavn
Stílað: Cecilia Vestureið., økisleiðari

**Umsóknarfreist: 25. januar 2008**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

# LANDSGRANNSKOÐANIN

## Móttøka

Í sambandi við, at **Beinta Dam** er tilnevnd landsgrannskoðari frá 1. januar 2008 verður almenn móttøka

**fríggjadagin 25. januar 2008 kl. 15 - 18**

Móttøkan verður í hølunum hjá Landsgrannskoðanini, Traðagøta 43, Argir.

**Øll eru hjartaliga vælkomin**

Vinarlig heilsan

LANDSGRANNSKOÐANIN